# Borgarstjórin heldur fram

**Hóast Páll á Reynatúgvu í almennum brævið hevur boðað frá, at hann leggur frá sær sum borgarstjóri á Sandi. So verður tað ikki á fyrst komandi kommunustýrisfundi**

KOMMUNAL-POLITIKKUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*



Mánadagin verður kommunustýrisfundur á Sandi. Har varð væntað, at Páll á Reynatúgvu, borgarstjóri á Sandi, fór at leggja frá sær, men soleiðis verður ikki.

– Eg havi boðað frá, at eg fari at leggja frá mær, men kanningararbeiði viðvíkjandi ákærunum og ivamálunum eru ikki liðug enn, og tí fari eg ikki at leggja frá mær mánadagin, sigur borgarstjórin.

Víðari greiðir Páll á Reynatúgvu frá, at hann hongir seg í ávísa orðing í brævinum »Eg leggi kongin«, sum gjørdist alment 7. septembur.

– Eg skrivaði, at eg fari at leggja frá mær á einum komandi kommunustýrisfundi, men fyrr enn kanningarnar eru lidnar, fari eg ikki at leggja frá mær, staðfestir Páll á Reynatúgvu.

Brævið varð av teimum flestur skilt, sum at borgarstjórin fór at leggja frá sær á fyrst komandi kommunustýrisfundi, men í brævinum stóð orðarætt: »Avgerðin verður framd í verki á einum komandi kommunustýrisfundi«.

## Brandur undrast

Brandur Sandoy, kommunustýrislimur, sum varð valdur á listanum hjá Páll á Reynatúgvu, men var við til at skriva brævið, har borgarstjórin varð biðin at leggja frá sær, og sum setti alt málið á Sandi í gongd, heldur tað vera stak óheppið, at borgarstjórin ikki leggur frá sær.

– Tað er óheppið fyri trivnaðin í bygdini, at borgarstjórin fyrst sigur, at hann leggur frá sær, og so broytir meining. Men eg væntaði ongantíð, at hann fór at leggja frá sær, og eg ivist enn, um hann fer at gera tað, sigur Brandur Sandoy.

## Kann merkja fundin

Spurdir um støðan í kommunustýrinum ikki kemur at merkja fundin, hóast tað bert eru mál frá nevndunum, sum verða viðgjørd, so eru Brandur Sandoy og Páll á Reynatúgvu rættiliga samdir.

– Eg fari ikki at gera meira burturúr, enn eg longu havi gjørt, men víðari veit eg ikki heilt, hvussu eg skal siga. Tað verður upp til kommunustýrislimirnar, sigur borgarstjórin.

Brandur Sandoy er rættiliga samdur við borgarstjóranum.

– Vit viðgera málini sum koma, og tað er borgarstjórin, ið ger fundarskránna. Hinvegin veit eg ikki reiðiliga, hvat meira eg skal siga. Men borgarstjórin burdi greitt okkum frá støðuni, heldur kommunustýrislimurin.

---

# Vit doyggja!

**Á heimsins hægstu politisku tindum kjakast tey nú um veðurlagsbroytingar. Semja er um at velja stór orð, men verður semja nú eisini um stór mál?**

Orðini um at "vit doyggja" eigur forsetin í Maldivunum Mohamed Nasheed. Oyggjaríkið Maldivurnar liggur í meðal bert hálvan annan metur omanfyri sjóarmálan, hægsta punktið í landslagnum er minni enn hálvan triðja metur høgt.

Røðan hjá forseta Maldivanna var tann mest bersøgna á tindinum í dag. Hann segði bart út, at hann var troyttur av at møta til funda, har hann verður settur at greiða frá, hví so týðandi er at minka útlát og forða fyri at heimshøvini hækka; øll nikka og eru samd um at 'okkurt má gerast' – men eftir ráðstevnuna kølnar ágrýtni og onki hendur. Maldivurnar hava tí sjálvar sett sær fyri at koma í 'koljavnvág' frá 2020, tvs. nullstillað útlát við orkusparing og at fanga kolsúrni í skóg ella øðrum goymslum. Umboðandi øll tey lágu og smáu londni heitti hann á heimsins lond um at seta málið til, at heimshitin í mesta lagi hækkar hálvt annað stig uppum støðið áðrenn ídnaðarkollveltigina – heimurin er longu ornaður ¾ stig.

**Nú ætli eg mær til Kjøbinhavn!**
Allan dagin snúðist kjakið annars um ráðstevnuna ið vera skal í Keypmannahavn. Sjáldan man danski høvuðsstaðurin vera so ofta nevndur í altjóða høpi. Men meiri týðandi var, hvat skal standa í skjølunum, tá fundurin í Bellacentrinum er av? Franski forsetin Sakorzy legði upp til, at málið skal vera tvey hitastig, at legði aftur og aftur dent á, at neyðugt er at leggja skatt á tær dálkandi fyritøkurnar – og vildi hava undanfund í novembur, har tey størstu útlátslondini kunnu semjast sínámillum udan fundinum. Nakað av hesum er franska trongdin at ganga á odda, hóast formaður ES, tann svenski Reinfeldt, var á fundinum og skuldi melda út vegna ES.

Mest spennandi var (hóast tann meiri dempaða stílin) tann kinesiska útmeldingin um at vilja áseta 'felags men tillagaðar skyldur' – hetta skal helst tulkast sum partvíst, at Kina vil minka útlát, men kortini vil hava pláss fyri sínum búskaparvøkstri; Kina vil t.d. planta øgiligar víddir av skógi at binda kolsúrni og verja móti øðrum avleiðingum av veðurlagsbroyting og oyddum viðavøkstri.

**Tað fullkomna er fíggindi hjá tí góða**
Skulu vit taka nakað av súrum útláti við, so er vandin at roynt verður eftir loysnum ið ikki bera til. Umleggingar til lægri útlát fara at kosta hundraðtals milliardir, sjálvt tey fátøku londini skulu helst brúka upphæddir ið fara uppum billiardina í okkara pengum. Slíkar upphæddir krevja bæði stóran stuðul frá teimum ríkaru og at skipað verður fyri handli við CO2-kvotum. Jú víðgongdari málini, jú verri verður at fremja hetta. Munurin ímillum 1½ og 2 hitastig, munurim ímillum 350 og 450 ppm av $CO_2$, munurin ímillum javnvág í 2050 ella 2080 er øgiligur, tá ið vit skulu umseta hesi mál til avgjøld, avmarkingar og avgerðir. Verður ikki útint og ikki hildið eftirlit og ikki fylgt upp, kann alt steðga, tí ongin vil vera – sum maldivin segði – tann fyrsti at leypa. Maldivarnir hava sett síni mál – og meina tey helst, men hvussu við Frakklandi, hvussu við restini av ES, hvussu við menningarlondum ið vilja minka um fátækradømi og svongd samstundis, hvussu við kreppuraktum londum við arbeiðsloysi?

Eisini spyrja fleiri, hvussu við alternativum? Er kanska betri at goyma kolsúrni, sproyta sjógv upp í loft at skapa fleiri skýggj ella á annan hátt byrgja fyri sólini? – er CO2 útlátsminkan veruliga einasta og rættasta málið?

Og so er størsti spurningurin loksins: hvat við USA?

Barack Obama vildi ikki tosa um mál og mátbarar eindir. Denturin hjá honum var á, at USA ger meira enn nakrantíð, at íløgur verða gjørdar sum ongantíð fyrr, at arbeiðspláss, vinna og sparingar fyri brúkaran eru í at fara frá (útlendsku) oljuni til varandi orku, orkusparingar og strangari krøv. Hetta kann vera ábending um, at hann longu hevur givið uppat at vera við í Keypmannahavnarskjalinum, men kann eisini vera fyrireiking til at fáa landsmenn at taka undir við tillaðingum – tí tær loysa seg!

Sigandi var tó, at tey stóru amerikansku bløðini morgunin fyri ráðstevnuna



gjørdu nógv burturúr stríðnum hjá Obama við guvernørin í New York (vil hava hann ikki at stilla uppaftur) og støðu hansara til onnur innanríkismál, men valla nevndu veðurlagstindafundin – eisini hóast óvanliga nógv regn hevur ført við sær mikla og sjálsama flóð millum annað í statinum Georgia – amerikumenn ræðast helst skatt verri enn flóðaldur.

**Kári á Rógvi,**
**løgtigsmaður**